# Nýtt skip á Vestmanna

**Eitt nýtt skip kom á Vestmanna týskvøldið. Tað er trolbáturin Vesturfarið, sum keyptur er úr Skagen**

SKIPAKEYP
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vestmanna:**
Vestmanningar hava fingið nýtt skip í flotan. Gamla Vesturfarið verður skift út við eitt nýtt, sum skal trola undir Føroyum.

Aksel Dahl-Olsen, sum er ein av eigarunum, sigur, at báturin er keyptur úr Skagen. Hann er bygdur í Frederikshavn í 1986 og sandblástur beinanveg, men er munandi umbygdur og umvældur, so hann í dag mestsum er nýggjur.

– Hann man vera eini 95 prosent ella so nýbygningur, sigur Aksel Dahl-Olsen.

Vesturfarið fer at trola á landleiðini. Hann er 20 tons til støddar og sostatt merktur 10 tons minni, enn gamla Vesturfarið er.

Men kortini er stórur munur á skipunum, sigur eigarin. Hesin nýggi báturin er bógv betri útgjørdur, enn tann gamli.

Manningarrúmini eru afturi á skipinum. Í kahúttini eru koyggjur til teir fýra menninir, sum við vera. Messa er eisini har afturi.

Frammi í skipinum eru goymslurúm, eins og eisini eitt neyðaggregat stendur har frammi til at taka.

Maskinan er ein ársgomul 387 HK Volvo Penta. Brúgvin er frá ár 2000, og pumpur og spøl eru nýggj. Tey hava teir flutt av gamla Vesturfarinum umborð á hendan bátin, sigur Aksel Dahl-Olsen. Lastin er klædd við glastrevjum og gjørd til at passa til kassarnar.

Á brúnni er alt, sum tíðin krevur. Til dømis tveir ARPA radarar, ekkolodd, GMDS A02, fýra VHF'ar, GSM fartelefon, NMT við faksi, gyrokumpass og magnetkumpass o.s.fr.

Skannari er til lemmarnar, eins og útgeð til fylgisveinaeftirlit eisini er umborð.

Trygdarútgerðin er tann, ið krevst. So sum flótidraktir til alla manningina og bjargingarbátar við tí, ið har til hoyrir.

Eldsløkkingarskipanin í maskinrúminum er nýggj, greiðir Aksel Dahl-Olsen frá. Hon eitur FirePro og er nógv meira umhvørvisvinalig enn til dømis halogen útgerðin, flestu skip annars hava. Hon er bæði sjálvvirkandi og kann útloysast við kontakt av brúnni, sigur hann.

Báturin er eitt sindur umbygdur aftan, so betri pláss er at arbeiða við tveimum trolum.

Tvey trol eru umborð, soleiðis at skjótari verður at koma í gongd aftur, um til dømis skrætt verður. Tá ber til at skifta beinanveg heldur enn at leggja stilt at bøta, sigur Aksel Dahl-Olsen.

Gamla Vesturfarið er lýst til sølu, men er ikki selt enn. Onkur er kortini áhugaður, sigur hann.

Trolloyvið hjá gamla Vesturfarinum, sum liggur á Vestmanna, er flutt yvir á tann nýggja bátin. Gamli báturin hevur tó línuloyvi eftir og verður seldur við tí.

Nýggja Vesturfarið varð keypt fyri 3,4 milliónir krónur og er umbygdur fyri 1,5 millión. Sostatt stendur báturin í knappliga fimm milliónum krónum, nú hnn liggur á Vestmanna.


*Vesturfarið kom á Vestmanna týskvøldið. Báturin skal trola undir Føroyum*
*Mynd: Edvard Joensen*


*Gamla Vesturfarið liggur á Vestmanna og bíðar eftir at verða selt. Línuloyvi fylgir við bátinum*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Enn ein rundkoyring

**Rundkoyringarnar gerast alt fleiri á landsvegunum. Endamálið er at tryggja ferðsluna, sigur landsverkfrøðingurin**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Landsverkfrøðingurin ger eina rundkoyrin á vegamótinum Vegnum Langa og Hvítanesvegnum. Hetta fyri at tálma ferðsluni á staðnum, verður sagt í tíðindaskrivi, Landsverkfrøðingsstovnurin sendi út um dagarnar.

Ferðslan er rættiliga nógv á hesum vegastrekkinum. Sambært landsverkfrøðinginum koyra umleið 7.500 bilar dagliga her.

Endamálið við hesari rundkoyringini er at skapa tryggari ferðslu fyri bæði gongugfólk og bilar, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Eitt stig í hesum sambandi er at gera gonguteig um Hvítanesvegin.


*Rundkoyringin við Hvítanesvegin og Vegin langa skal betra um ferðslutrygdina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað hevur leingi verið arbeitt við at bøta um trygdina á júst hesum vegastrekkinum, sigur landsverkfrøðingurin. Ikki minst tí foreldur á Hvítanesi hava strongt á at fáa gjørt nakað við trygdina her, ið nógv børn ferðast á veg í og úr skúla.

Ætlanin við rundkoyringini er at fáa bilførarar at seta ferðina niður, tá teir koma til rundkoyringina. Soleiðis verður eisini léttari hjá teimum, sum koyra, at varnast gongufók á vegnum, heldur landsverkfrøðingurin.

Avtalað er við Tórshavnar Kommunu at gera eina gongugøtu fram við vegnum millum Hvítanes og rundkoyringina. Hesa skal Tórshavnar Kommuna gera.

Tað er s/pf Karl Paturssson, sum undir eftirliti av landsverkfrøðinginum ger arbeiðið, sum mett verðar at fara at kosta tvær milliónir krónur. Arbeiðið byrjaði í november ov verður eftir ætlan liðugt í mei næsta ár.

Hendan rundkoyringin verður tann fimta í røðini av rundkoyringum á landsvegunum. Hinar eru í Runavík, Kollafirði, oman fyri Norðskála og við Skipaneskrossin undir Gøtueiði.



# Nú er aftur vandi fyri at øll aling í Suðuroy fer fyri bakka

**Nú nýval er útskrivað, ivast Bjarni Djurholm, um hann hevur heimild at geva endurreistu alivinnuni í Suðuroy aliloyvi. Tí er vandi fyri, at málið verður súltað, líka til nýggj samgonga er skipað eftir valið. So hendir onki, fyrrenn í vár og tað kann fáa álvarsligar avleiðingar**

ALILOYVI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Øll tey mongu, sum reistust úr stólinum í frøi um, at alingin í Suðuroy varð endurreist, mugu heldur setast aftur.

Í hvussu so er fyribils.

Nú er tað nevniliga slett ikki vist, at tað verður nøkur aling í Suðuroy.

Eftir at alt virksemið hjá Hera Hjelm var farið fyri bakka, var eitt nýtt felag sett á stovn eftir drúgvar samráðingar. Hetta felagið fekk navnið Faroe Farming og tað skuldi so føra alingina í Suðuroy víðari.

Men treytin fyri tí var, at aliloyvið hjá gamla felagnum verður flutt yvir á nýggja felagið.

Nýggju alararnir í Suðuroy høvdu fingið at vita, at tað var ongin trupulleiki at flyta aliloyvið yvir á tað nýggja felagið.

Men nú vísir tað seg kortini, at tað kann gerast ein rættiliga stórur trupulleiki. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevði ikki avgreitt málið, tá ið nýval varð útskrivað.

Og nú val er útskrivað, er tað ikki vist, at hann yvirhøvur hevur heimild til at flyta loyvið.

Tað skal landsstýrismaðurin nú kanna út í æsir og tí hevur hann givið sær sjálvum eina umhugsunartíð.

– Eftir aliloyvini er ongin ivi um, at eg havi heimild til at flyta aliloyvi yvir til nýggja felagið, sigur landsstýrismaðurin.

Men spurningurin er, hvat stýrisskipanarlógin loyvir honum.

– Landsstýrið, sum nú situr, er bara ein starvsstjórn. Tað merkir, at Landsstýrið kann bara avgreiða tað, sum er avgerandi neyðugt fyri at samfelagið kann virka, men ikki meiri enn tað.

Bjarni Djurholm sigur, at hann tekur onga avgerð, fyrrenn hann hevur fingið heilt greitt at vita, at hann hevur heimild til at taka avgerð um at flyta aliloyvi.


*Bjarni Djurholm fer ikki at taka støðu til aliloyvið til endurstovnaðu alivinnuna í Suðuroy, fyrenn hann hevur tryggjað sær 100%, at hann hevur heimild at taka støðu. Avleiðingin kann verða, at ongin avgerð verður tikin fyrrenn einaferð í vár*

**Kom í klemmu**

Men nú er tað nakað síðani, at Faroe Farming yvirtók alingina í Suðuroy. Hví er málið ikki avgreitt fyrr?

– Tað er nýtt í Føroyum, at eitt aliloyvi verður flutt frá einum felag til eitt annað. Tað er ofta hent, at alivirki eru farin á húsagang, so at aliloyvi eru fallin aftur til landsstýrið.

– Men í hesum føri skal ein avgerð takast, sum kann gerast fordømi og sum kann slóða fyri eini ávísari mannagongd, tá ið líknandi mál taka seg upp.

Tí vildi Bjarni Djurhom, at avgerðin í hesum málinum skuldi byggja á greiðar og væl lýstar reglur.

Seinastu tíðina hevur ein bólkur við umboðum fyri vinnumálaráðið, peningastovnarnar og vinnuna sitið og útgreinað ymisk viðurskifti í alivinnuni.

– Fyrst í september varð frágreiðingin liðug og ætlanin var at taka tað upp á Landsstýrisfundi í farnu viku.

Bjarni Djurholm vísir tó á, at politiska kreppan førdi við sær, at ongin landsstýrisfundur varð og tí kom málið í klemmu og sostatt er tað avgreitt.

– Eg havi boðað frá, at eg takið onga avgerð, fyrrenn tað er púra greitt, hvørjar heimildir eg havi, serliga tá ið hugsað verður um, at hendan avgerðin kann skapa fordømi.

Bjarni Djurholm sigur, at hinvegin má hann eisini hugsað um hvørjar avleiðingar tað fer at fáa, verður niðurstøðan tann, at aliloyvi ikki kann flytast yvir til nýggja felagið, soleiðis sum støðan er.

– Verður avgerðin tann, at onki skal gerast nú, er mest sannlíkt, at onki hendir fyrrenn í vár, tí eftir valið tekur tað eisini eina tíð at skipa nýggja samgongu og hjá nýggja landsstýrismanninum at seta seg inn í málið.

Landsstýrismaðurin sigur, at sum støðan í alivinnuni er í løtuni er væl hugsandi, at hetta fer alivinnan í Suðuroy ikki at tola og at hon tí ordiliga fer fyri bakka.

– Tað er eisini umráðandi fyri okkum, at vinnuliga virksemið ikki fer fyri bakka og í hesum føri er talan um ógvuliga kærkomin arbeiðspláss í Suðuroy.

– Spurningurin er eisini um ov nógv drál í hesum føri er tað sama sum at lata samfelagslig virði fara fyri skeyti og tað er spurningurin um vit kunnu loyva okkum tað.

Bjarni Djurholm sigur, at eitt, sum eisini liggur í hesum er um hann hevur politiska undirtøku fyri at flyta aliloyvið yvir til nýggja felagið, soleiðis sum politiska støðan er í løtuni, og tað ætlar hann sær eisini at kanna.

– Men tað er greitt, at út frá einum vinnuligum sjónarmiðið hevur tað stóran týdning at avgerðin verður tikin sum skjótast, antin svarið so verður nei ella ja, leggur landsstýrismaðurin afturat.

Alingin í Suðuroynni:

# Bíða ikki nógvar dagar afturat

**– Vit skilja púrt onki av, at landsstýrismaðurin ikki hevur flutt okkum aliloyvið enn. Fellur avgerðin ikki fyrsta dagin, er spurningurin, um vit ikki noyðast at taka okkum aftur, sigur Erhard Joensen, stjóri í Faroe Farming í Suðuroy**

ALING Í SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit skilja púra onki, men vit kunnu ikki bíða nógvar dagar afturat.

Tað sigur Erhard Joensen, stjóri í Faroe Farming, sum er felagið, sum ætlaði at endurreisa alingina í Suðuroy.

Hann sigur, at teir fingu at vita, at tað var ongin trupulleiki at flyta aliloyvi yvir til nýggja felagið, tí tað var ikki annað enn ein umsitingarligur spurningur.

– Er talan um ein umsitingarligan spurning, skilja vit ikki, hví landsstýrismaðurin ikki vil umsita, tí hetta kundi verið avgreitt langt síðani, sigur Erhard Joensen.

Hann sigur, at treytin fyri at nýggja felagið kann yvirtaka alingina, er sjálvsagt, at aliloyvið kundi flytast yvir til nýggja felagið.

– Og verður aliloyvið ikki flutt, er avtalan um at yvirtaka alingina sostatt eisini burturdottin.

Nú eru teir so í teirri støðu, at teir fara ikki at bíða nógvar dagar afturat, tí hendir onki fyrsta dagin, fara tey at viðgerða støðuna.

Tað eru fimm feløg í Faroe Farming. Sjálvir hava suðuroyingar stovnað Suðurlaks, sum er eitt av teimum fimm feløgunum.

– Verður ein avgerð ikki tikin ein av fyrstu døgunum, fer í hvussu so er Suðurlaks at viðgerða støðuna.

– Tà mugu vit taka støðu til, um vit noyðast at taka okkum úr, ella um vit eru sinnað at bíðað til í vár eftir einum møguligum loyvi.

Samstundis leggur hann dent á, at ongin støða er tikin til, hvat verður gjørt, kemur ikki játtandi svar frá Vinnumálaráðnum fyrsta dagin.

– Men tað sigur seg sjálvt, at íløgan er so mikið stór, at tað fer ikki at bera til at bíða til í vár eftir eini avgerð.

– Serliga tá ið vit ikki vita, hvør avgerðin verður. Politikkur er soleiðis háttaður, at har er ongin trygd fyri nøkrum, sigur stjórin í Faroe Farming.

Tá ber heldur ikki til at fóðra smoltið á fjørðinum í tað óndaliga, uttan at vita, hvar vit flóta.

Tí heldur hann, at Bjarni Djurholm má taka eina avgerð ein av allarfyrstu døgunum.

– Vit hava bíðað í tríggjar vikur og vit kunnu ikki bíða nógvar dagar afturat. Vit eru sera ótolnir eftir einum svari nú, leggur hann afturat.

Hann dugir ikki at síggja, at hetta skal vera eitt so trupult mál, tí aliloyvi eru oftani flutt ímillum feløg

– Nú aftaná, kunnu vit bara iðra okkum um, at vit ikki syrgdu fyri at fáa aliloyvið upp á pláss, áðrenn vit brúktu so nógva tíð uppá at fáa felagið á føtur, sigur Erhard Joensen.


*– Fáa vit at vita, at vit ikki fáa aliloyvið fyrrenn í vár, er tað ein spurningur, um vit ikki mugu taka okkum aftur, tí so leingi kann ein stór íløga, sum hetta, ikki vera í óvissuni, sigur Erhard Joensen, stjóri í endurreistu alivinnuni í Suðuroy*